## Konservativu á odda

Lokalval verður í Onglandi og Wales hósdagin, og sambært meiningakanningum standa teir konservativu at vinna. Teir hava gingið alsamt fram í kanningunum seinasta mánaðin, og sambært ComRes, sum hevur gjørt eina veljarakanning fyri The Independent, liggja teir konservativu nú til 40% av atkvøðunum, sum er tvey prosent meir enn fyri einum mánað síðani, meðan Labour fær 26%, sum er 5% færri. Liberalu Demokratarnir fáa 3% meir og koma upp á 20%, meðan aðrir flokkar tilsamans fáa 14% av atkvøðunum, skrivar Sky News.



## Hús fyri milliardir

Sambært dagblaðnum Mail on Sunday hevur Roman Abramovich, russiskur oljumilliardingur og eigari av Chelsea, søkt um byggiloyvi til eitt risastórt hús í átta hæddum, harav tær tríggjar skulu verða undir jørð. Har skulu verða bæði privatbiografur, innandura svimjihylur, dampbað og spælirúm. Bygningurin skal liggja í Knightsbridge í London, har eisini vøruhúsið Harrod's liggur, og fer ætlandi at kosta 1,5 milliardir krónur tá hann er liðugur. Talan verður um dýrasta privata heimið í Onglandi.

# Ung skulu stíga fram



*- Tað kann ikki vera rætt, at føroyskar mammur eru tvungar til at flyta av landinum, tí lestrarmøguleikarnir eru betri í Danmark, har tær eisini fáa bústaðarstuðul, frían barnagarð og hægri stuðul annars, segði Miriam Michelsen, forkvinna í Unga Sambandinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Miriam Michelsen er nýggj forkvinna í Unga Sambandinum. Tað hevur sett seg rættiliga fast í henni, tá hon á sambandsfundi fyrstu ferð møtti Edmundi Joensen, fólkatingsmanni. - Eg minnist, at tá hann reisti seg upp at taka í hond mína, hugsaði eg, at hann er nógv størri í veruleikanum enn í sjónvarpinum! Á fundinum lærdi Edmund meg ein hóp um samfelagsviðurskifti, sigur forkvinnan, sum heldur, at tað er nú, at tey ungu skulu traðka til, so tey kunnu gera mun**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Yngsti røðari á landsfundi Sambandsflokinsins leygardagin var Miriam Michelsen, forkvinna í Unga Sambandinum. Eftir at hon hevði verið á pallinum, fekk hon nógv rósandi orð, og tað var ikki sørt, at onkur sá hana, sum enn eina møguliga – og komandi – kvinnurødd í Sambandsflokkinum, sum tíðin gongur.

Tá ið Sosialurin fekk nøkur av løgtingsfólkum floksins at stilla upp til myndatøku saman við Miriam og Jógvani Dahl, sum eisini umboðaði Unga Samband á landsfundinum, helt royndi og garvaði politikarin og fólkatingsmaðurin fyri, at "um nøkur ár verður tú kanska Føroya løgmaður..."

Men hvat segði so kvinnuliga stjørnuskotið hjá Unga Sambandi á landsfundinum?

### Nógv størri

- Tað er eitt sindur løgið hjá mær at standa her og halda røðu. Hetta er ikki nakað, eg hevði kunnað droymt um kundi lata seg gera, sjálvt um eg altíð havi havt sterkar meiningar um ymisk viðurskifti.

Miriam mintist aftur á dagin, tá Jóhan Dahl spurdi hana, um eg hevði hug at koma á ein fund hjá Unga Sambandinum.

- Tá visti eg ikki, hvat eg skuldi svara, men so hugsaði eg, at tað kanska hevði verið gott, um eg slapp at siga okkurt. Eg fór á fundin fyri at vita, hvørjar ætlanir Unga Sambandi hevði fyri framtíðina, men segði við meg sjálva, at um eg kom í nevnd, fór eg bara at vera eykalimur. Hetta endaði so kortini við, at eg kom útaftur úr sambandshølunum sum forkvinna.

Miriam segði, at tá ið hetta frættist kring um í Vágsbygd, var tað ein øgilig umrøða, hetta fekk, og hon var eitt sindur bangin fyri, hvussu tað fór at vera at "svinga" við teimum gomlu tjóðveldismonnunum í Vági.

- Men tá Jóhan Dahl ein dagin ringdi og bað meg koma á fund saman við øllum teimum høgt mettu

> *Eg fór á fund fyri at vita, hvørjar ætlanir Unga Sambandi hevði fyri framtíðina... (Miriam Michelsen)*